# 17 ára gamal til HM við Onglandi



Sven Gøran Eriksson tók í gjár liðið út, sum skal umboða Ongland í HM-endaspælinum í summar. Tað kom fullkomiliga óvart á øll, at 17 ára gamla stórtalentið Theo Walcott, sum Arsenal júst hevur keypt, skuldi verða tikin út. Enn hevur Walcott ikki spælt í Premier League, men hann skal við enska ferðalagnum til Týsklands. Eriksson sigur, at hetta er ein stórur kjansur at taka, men hann vil taka ein kjans við einum av teimum 23 spælarunum í hópinum.

- Theo er skelkaður av úttøkuni. Hann hevði væntað eitt gott úrslit – altso til teoriroyndina, sum hann kláraði í dag – men hetta hevði hann ikki roknað við, sigur pápi Walcott.

# Met og gullmerki

Tað gekst væl, tá fýra føroyingar um vikuskiftið tóku lut í Tårnby Games, sum er kapping í frælsum ítrótti. Rannvá Djurholm, Bjørk Herup Olsen, Regin Joensen og Rúni Seloy vóru føroysku umboðini, og tey fingu framúr úrslit. Millum annað setti Bjørk nýtt føroyskt met á 1500 metra teininum við 5.11,96, meðan Regin Olsen vann gull á 800 metra teininum.





*Nógv varð gjørt burtur úr. Ikki minst vøkru búnunum, sum allar tær íðkandi vóru í*

*Eftir fýra FM-heiti á rað til Havnar Fimleikafelag, varð tað hesa ferð Støkk, sum fekk flestu stigini. Talan var um eina framúr vakra seriu, sum eisini prógvaði stóru framstigini, sum eru gjørd, síðani estetiskur fimleikur varð settur á dagsskrá í Føroyum*

*Fyri fyrstu ferð varð eisini skipað fyri FM hjá yngru fimleikarunum eftir reglunum fyri estetiskum fimleiki. Her síggja vit flottu framførsluna hjá smágentunum í HF*



*Ljósið gjørdist hesaferð nummar trý í kappingini*

**Úrslitini vóru hesi:**

Pinkur:

| | | |
|---|---|---|
| Nr. 1: | Havnar Fimleikafelag A | 13,65 stig |
| Nr. 2: | Støkk | 13,17 stig |
| Nr. 3: | Ljósið | 12,85 stig |
| Nr. 4: | Havnar Fimleikafelag B | 12,67 stig |

Smágentur:

| | | |
|---|---|---|
| Nr. 1: | Havnar Fimleikafelag A | 16,72 stig |
| Nr. 2: | Støkk A | 14,85 stig |
| Nr. 3: | Havnar Fimleikafelag B | 14,52 stig |
| Nr. 4: | Ljósið | 14,40 stig |
| Nr. 5: | Støkk B | 14,03 stig |

Kvinnur:

| | | |
|---|---|---|
| Nr. 1: | Støkk | 16,57 stig |
| Nr. 2: | Havnar Fimleikafelag | 16,50 stig |
| Nr. 3: | Ljósið | 14,20 stig |
| Nr. 4: | Flog | 12,17 stig |